# Trumfurin er neyvan snildur taktikkur

**Løgmaður roknar ikki við, at avtalan hjá dønum við grønlendingar um uttanríkispolitisku heimildarnar er ein taktiskt trekk fyri at trýsta føroyingar. Men í bakspeglinum kann tað líkjast einum taktiskum leiki, heldur hann**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*



*– Eg ivist í, um hetta hevur verið eitt bevíst taktiskt trekk hjá dønum at gera eina avtalu við grønlendingar fyrst, men í bakspeglinum líkist tað einum taktiskum leiki, heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

– Tann góði taktikkurin verður ongantíð avdúkaður.

Soleiðis svarar løgmaður, tá ið hann verður spurdur um viðmerkingina hjá blaðstjóranum á Ekstra-Blaðnum, Hans Engell, sum í eini tinghelluni í Sosialinum rør fram undir, at danska stjórnin fer at brúka avtaluna hjá dønum við grønlendingar um uttanríkispolitisku heimildarnar sum ein trumf mótvegis føroyingum.

– Eg ivist í, um hetta hevur verið eitt bevíst taktiskt trekk hjá dønum at gera eina avtalu við grønlendingar fyrst, men í bakspeglinum líkist tað einum taktiskum leiki, heldur Jóannes Eidesgaard.

– Hans Engell er ein góður eygleiðari, og hann hevur stóra vitan um, hvussu tað politiska spælið er í Danmark, og hann kallar so avtaluna við grønlendingar fyri ein trumf hjá donsku stjórnini. Eg kann bara siga, at vit fara ikki at góðtaka somu avtalu, sum danir hava gjørt við grønlendingar.

### Føroyingar av sporinum

Ætlanin hevur leingi verið, at føroyingar og grønlendingar skulu fáa størri heimildir á uttanríkispolitiska økinum. Tað ítøkiliga arbeiðið við hesum byrjaði í einum embætismannabólki mannaðum við dønum, føroyingum og grønlendingum, og ætlanin var, at avtalurnar skuldu koma í gildi á nýggjárinum í ár.

– Alt arbeiðið við avtalunum hjá føroyingum og grønlendingum var parallelt til desember mánað í fjør, tá ið danir bóðu føroyingar um at fáa betur stundir at umhugsa seg í. Samstundis hildu samráðingarnar við grønlendingar fram, og har er ein avtala komin burturúr, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Avtalan millum danir og grønlendingar passar ikki til okkum, tí fara vit ikki at góðtaka somu avtalu, sigur løgmaður.

### Bíða eftir

Samráðingarnar millum føroyingar og danir um uttanríkispolitisku heimildirnar hava ligið stillar síðani desember mánað í fjør, og nú bíðar landsstýrið eftir, at fólkatingsvalið er av, og danir aftur hava eina arbeiðsføra stjórn.

– Eg tosaði við Anders Fogh Rasmussen nakrar fáar dagar, áðrenn hann útskrivaði valið, og tá tosaðu vit um, hvussu vit kundu fáa samráðingarnar í gongd aftur. Tað eru fleiri møguleikar, og nú bíða vit eftir, at fólkatingsvalið er farið afturum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at sjálvstýrisarbeiðið í Føroyum og Grønlandi er so ymiskt, at avtalurnar hjá kunnu ikki verða eins.

– Føroyingar og grønlendingar hava sera ymiskar fortreytir, og tí kann sjálvstýristilgongdin í Føroyum og Grønlandi ikki synkroniserast, sigur Jóannes Eidesgaard, sum ikki dugir at meta um møguleikarnar fyri at fáa eina øðrvísi uttanríkispolitiska avtalu við danir, enn grønlendingar hava fingið.

# Eivør fekk einki

**Eivør Pálsdóttir fekk hvørga av íslendsku tónlistavirðislønunum, sum hon var í uppskoti til. Heldur ikki Bjørk fekk hesar virðislønir. Ársins songkvinna gjørdist Ragnheiður Grøndal**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein, eydun@sosialurin.fo*

Mikukvøldið vóru árligu tónlistavirðislønirnar í Íslandi handaðar í Tjóðleikhúsinum í Reykjavík.

Millum tey mongu fólkini, sum vóru í uppskoti til teir ymsu virðislønirnar, var føroyska songkvinnan Eivør Pálsdóttir, sum seinnu árini hevur verið millum heitastu nøvnini í íslendskum tónleiki, og sum gevur sín tónleik út hjá íslendska plátufelagnum 12 Tónar.

Eivør var saman við øðrum stilla inn til tvær virðislønir. Onnur var sum Ársins songkvinna, og hin var fyri at hava gjørt Ársins poppfløgu.Men í hvørgum føri eydnaðist tað Eivør at vinna.

Hon segði áðrenn handanina, at hon var errin bara av at vera innstillað, men væntaði ikki at vinna.

### Bjørk vann heldur ikki

Millum tey, sum Eivør kappaðist við, var heimskenda íslendska songkvinnan Bjørk, men heldur ikki hon vann hesar báðar virðislønir. Bjørk kundi tó ugga seg við, at hon vann fyri ársins sjónbandalag.

Ársins songkvinna gjørdist Ragnheiður Grøndal, og ársins poppfløga gjørdist »Mugimama, Is This Monkeymusic?« hjá Mugison.

Ársins sangari gjørdist Páll Rósinkrans, og Ársins rockfløga var »Hljóðlega af stað« hjá Hjálmari.



*Eivør Pálsdóttir var errin av at vera innstillað til tvær íslendskar tónlistavirðislønir, men hon vann onga hesaferð. Í fjør vann hon tvær slíkar*

## Klaksvík og Bláí Krossur samstarva

Mikudagin fundaðust umboð fyri Bláa Kross og Klaksvíkar kommunu um eitt nýtt samstarv, sum partarnir fara at hava næstu trý árini.

Samstarvið kallast »Børn í vanda« og snýr seg um fyribyrging av rúsdrekkanýtslu.

Hugskotið er at veita børnum, næmingum, foreldrum og øðrum kunning og frálæru, so at uppvøksturin hjá børnum verður rúsfríur.

Farið verður undir hesa verkætlan í næstum, og øll húsarhald í Klaksvík fáa í tí sambandi ein faldara um átakið.

*ek*

## Árnafjørður fær reinsað vatn

Seinni í hesum árinum fer sóttreinsað vatn at renna úr vatnkránunum í Árnafirði. Tað skrivar heimasíðan hjá Klaksvíkar kommunu.

Í august í fjør var arbeiðssáttmáli undirskrivaður, og nakað fyri jól byrjaði sjálvt arbeiðið at gera reinsiverk. Gongur tað sum ætlað, fáa árnfirðingar sóttreinsað vatn longu í ár.

Tað er Sp/f Dorus S. Johannessen, sum stendur fyri arbeiðnum, og tað umfatar grevstur, legging og tyrving av rørleiðingum, avgrevstur fyri goymslu og reinsuverksbygningi og gerð av vatntøku í Stórhøvdaá í Árnafirði. Arbeiðið byrjaði fyri jól í fjør.

Verkætlanin í Árnafirði er ein liður í framhaldandi vatnútbyggingunum í Klaksvíkar Kommunu, har arbeitt hevur verið við nøkrum uppskotum viðvíkjandi sóttvatnsveiting til Árnafjørð. Eftir nærri umhugsan fall valið á Stórhøvdaánna. Har rennur sera reint kelduvatn, sum møguliga ongantíð tornar upp.

Allan tann tøkniliga útbúnaðin til reinsiverkið hevur Nomatek framleitt, bæði sandfiltur og UV-stráluútgerð, og felagið fer eisini at seta útgerðina upp.

Sóttvatnsgoymslutangin verður um 80 rúmmetrar til støddar, og møguleiki verður eisini fyri einum tanga afturat. Um neyðugt, verður eisini gjørligt, seinni, at útbyggja sjálvt reinsiverkið við einum sandfilturi.

*ek*